TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*»At toskurin veksur skjótt, gevur føroyingum ein heilt serligan kappingarfyrimun framum alarar í øðrum londum«*

*Mikkjal Hammer, Faroe Cod Farm*

# Dagur & Vika í nýggjum hølum og hami

**Mánakvøldið sóu sjónvarpshyggjarar kring alt landið nýggja studioið hjá Sjónvarpinum. Karmarnir eru fullkomiliga broyttir, sjálv sendingin hevur eisini verið fyri broytingum. Arbeiðið hevur staðið á í eitt hálvt ár, og samlaði kostnaðurin er fimm milliónir krónur**

KRINGVARPIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Uttan at hyggjarin legði merki til tað, fór Sjónvarpið fyri einum hálvum ári síðani undir at gera eitt studio. Eitt nýtt studio til Dag & Viku, Kjakið, 3-2, Gekkin og Mentanartíðindi. Seinastu tíðina hevur hyggjarin so merkt hetta arbeiði, tí Dagur & Vika gjørdist brádliga munandi styttri enn vanligt. Mong ilskaðust um hetta, at tann framman undan stutta tíðindasendingin skuldi styttast. Sjónvarpið bað hyggjaran bera yvir við sær, og tað gera tey flestu helst í dag, nú Sjónvarpið tvær ferðir hevur sent tíðindasendingina úr nýggju hølunum og í einum nýggjum hami.



### Broytt Dagur & Viku

Sjónligasta broytingin, sum hyggjarin sá á skíggjanum mánakvøldið, var nýggja studioið. Tá eygað hevði vant seg við nýggju hølini, vóru beinanvegin aðrar broytingar at síggja.

Fyrst og fremst hevur sendingin broytt ham. Dagur & Vika er nú í tveimum pørtum – DV og DV-Pluss. DV (stytting fyri Dagur & Vika) er tíðindaparturin, sum verður umleið 11 minuttir til longdar. Tað verður sent mána-, týs-, hósog fríggjakvøld klokkan 19, men hesin tíðindaparturin verður nakað styttri enn gamla Dagur og Vika var.

Eftir DV mána-, týs og hóskvøld verður DV-Pluss. Lyklaorðini í hesari sending eru innlit, perspektiv og undirhald. Her koma gestirnir í sjónvarpsstovuni at spæla ein týðandi leiklut. Gestir, sum vita, geva innlit, perspektivera og analysera.

– Við undirhald verður hugsað um, at pláss skal eisini vera fyri bleytari tilfari, sum gevur hyggjaranum ein uppliving ella bara undirheldur. Hesi innsløgini nýtast ikki at hava gest við ella skulu gera øll so øgiliga klók, skrivar Sjónvarpið í tíðindaskrivi.

Fríggjakvøld verður einki DV-Pluss. Tá verða Mentanartíðindi sum tað plagar, og Kjakið sum vit higartil hava kent tað, verður ikki fastur partur av skránni, men heldur sett á, tá hildið verður at tað er neyðugt.

Mentanartíðindi og Gekkur fáa eisini rúmd í nýggja studionum, men tað ganga nakrar vikur áðrenn tað er komið upp á pláss.

**FAKTA**

Herluf Sørensen hevur samskipað alt arbeiði.
Carsten M. Arnskov og Hans Andor Johannesen hava uppbygt og monterað kontrolrúmið.
Kim Fridbjørg hevur sniðgivið studio (sami maður, sum hevur sniðgivið hjá Danmarks Radio)
Danska fyritøkan Timeline og Robert Schmidt hava sniðgivið nýggjan grafikk
Øssur Hjalt og Kristin Gærdbo hava gjørt snikkara- og timburarbeiðið
Regin Toftegaard hevur gjørt tónleikin til nýggjar jinglur. (í kapping við tveir aðrar)

### 3-2 mánakvøld og hóskvøld

Ein onnur minni broyting er eisini, at ítróttarsendingin 3-2 eisini verður hóskvøld. Altso 3-2 verður sum vant mánakvøld, men eisini hóskvøld í eini fimm minuttir langari sending, sum leggur upp til ítróttin um vikuskiftið og tekur útlendskan ítrótt við.

### Kostar 5 milliónir

Íløgan kostar fimm milliónir krónur. Av teimum eru fýra milliónir brúktar til tøkni og kontrolrúm, sum er bygt í einum parti av bilskúrinum hjá sjónvarpinum. Meginparturin av hesum er leys útgerð, sum kann takast niðan við, tá ætlanin, um at útbyggja og flyta alt Kringvarps-virksemið niðan í Sortudíki, verður framd í verki.

Tí er henda íløgan ikki skeiv, hevur stjórin í Kringvarpinum, Jógvan Jespersen, sagt.



*Karsten Arnskov og Herluf Sørensen í nýggja kontrollrúminum hjá sjónvarpinum*

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins og ein stóran part av almenna bókhaldinum.

Roknskaparhaldið á gjaldstovuni virkar sum eitt konsernroknskaparhald. Gjaldstovan tekur sær av t.d. inngjaldingum og útgjaldingum fyri stovnar.

Á gjaldstovuni arbeiða 32 fólk. Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle E-Business suite. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar:

- Felags lønarskipan
- Felags útgjaldingarskipan
- Búskettskipan
- Leiðslukunningarskipan
- Dátuvøruhús

Talið av brúkarum av loysnunum hjá Gjaldstovuni liggur okkurt um 1000.

Í løtuni verður arbeitt við at gera roknskaparhaldið á Gjaldstovuni 100% talgilt. Tað sum eyðkennir Gjaldstovuna eru broytingar, og at tað støðugt verður arbeitt við at menna verandi og nýggjar loysnir.

Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan arbeiðir við førleikamenning, hevur eina flekstíðarskipan, og í fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

www.gjaldstovan.fo

## Starv í bókhaldinum



**Arbeiðsuppgávurnar fevna í høvuðheitum um:**

- avstemmingar t.d. millum ymsar skipanir
- vanligt bókhaldsarbeiði, sum kontering, bóking, ljóslesing, gera ymsar koyringar og arkivering
- arbeiði við landsroknskapinum
- samskifti við stovnar og borgarar

Lagt kann verða afturat, at starvsinnihaldið kann verða broytt í mun til tær royndir og útbúgving, sum tú hevur. Eisini skal tú avloysa við at fyrisita útgjaldingar landsins.

**Krøv:** Tað er fyrimunur, um tú hevur útbúgving á roknskaparøkinum - antin á hægri handilsskúla, ella hevur tikið roknskaparfakini á merkonomstigi e.t. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir frá bókhaldi. Talan er um eitt stórt roknskaparhald, har fleiri skipanir virka saman fyri at skapa eina størri heild. Tí er tað týdningarmesta, at tú hevur yvirlit og hevur skjótt við at seta teg inn í ting. Tú skalt verða ein positivur persónur, sum hevur góð samstarvsevni, og sum ikki ert bangin fyri at taka ímóti nýggjum avbjóðingum og broytingum.

**Gjaldstovan kann bjóða:** Stovnurin kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð. Nevnt kann verða, at stórur partur av bókhaldinum á gjaldstovuni er talgilt.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna, og starvið er lønt sbrt. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Treytað av útbúgving og royndum, so er starvið lønt í bólki III ella IV.

**Umsóknir:** Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 29. januar 2007. Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Maluna Rasmussen tel 35 24 75 ella tel 35 24 00.

DIMMALÆTTING 341200